Dagliga arbeiðir hann í Vestmanna Timburhandli, sum nú er farin saman við Fjarðahúsum í Kollafirði.

– Tá eg byrjaði í timburhandlinum visti eg ikki nógv um timbur. Í veruleikanum alt ov lítið.

– Men so líðandi byrjaði eg at fáa skil uppá timbur, skrúvir og alt hitt sum vit høvdu. Hini starvsfólkini vóru sera vinarlig móti mær.

– Eg haldi sjálvur, at eg lærdi málið rættiliga skjótt, greiðir Pidi frá.

(Rætt hevur hann í tí, tí øll henda samrøðan er gjørd á føroyskum máli. Ikki eitt fremmand orð varð brúkt!, blðm.)

## Tað kemur oysini

Tá ein flytir til eitt fremmant land er tað at læra mál og mentan at kenna av avgerandi týdningi fyri, hvussu væl ein kemur inn á fólkið.

Fyri Pidi var púra greitt, at við at læra seg at samskifta á føroyskum máli, fór tað at gerast lættari at trívast í hesum fremmanda landinum.

Hann hevði áður spælt hondbólt saman við Daniel Rápa í Rumenien, og hesin var honum til stóra hjálp ta fyrstu tíðina í Føroyum.

– Daniel og konan Ioana byrjaðu at tosa føroyskt við meg. Og tá starvsfelagarnir eisini gjørdu tað sama, kom eg rættiliga skjótt eftir málinum, sigur Pidi.

Í dag tosar hann flótandi føroyskt og skilir tað sum verður sagt. Hann dugir eisini rættiliga væl at lesa føroyskt, men tá talan er um at skriva okkara trupla mál hevur tað verið heldur truplari.

– Men tað man oysini fara at koma, sigur hann á týðiligum vestmannamáli.

Pidi hevur tó ikki bert spælt hondbólt og arbeitt. Hesa tíðina hann hevur verið í Føroyum hevur hann m.a. tikið tað stóra koyrikortið, og hevur somuleiðis tikið skeið til koyring av trukkum og arbeiði við krana.

Hann hevur ongar ætlanir um at venda aftur til heimlandið Rumenien. Men, hvussu er tað: Er hann føroyingur ella rumeni?

– Nei, eg eri ikki blivin føroyingur enn. Tað fara helst at ganga nøkur ár aftrat, áðrenn eg verði tað!, slær hann fast.



*Húsini hjá Pidi vórðu reist leygardagin. Og hann væntar at kunna flyta inn í tey í ár. Hann arbeiðir hjá Fjarðahúsum í Kollafirði, og húsini eru sjálvandi av hesum slagnum!*

## Míni egnu hús

Pidi er føddur og uppvaksin í tí partinum av Rumenien, ið kallast Transylvanien. Har búgva foreldur hansara og ein systir.

Hann hevur nú búð í Føroyum seinastu seks árini, og ætlar at verða verandi her. Hetta seinasta er kanska ikki minst orsakað av, at hann hevur funnið sær unnustu úr Vestmanna.

– Eg tími ikki bara at leiga og leiga. Nú vil eisini hugsa um framtíðina og eiga míni egnu hús.

– Og húsini eru sjálvandi Fjarðahús, sigur Pidi við einum brosi.

Honum dámar væl her í Vestmanna, og tá hann so søkti um eitt grundøki og fekk eisini eitt í nýggju útstykkingini. Tá var einki annað at gera enn at fara til verka.

Hann hevur fingið góða hjálp frá verfamiljuni. Og seinasta leygardag vórðu húsini reist!

– Eg vóni at vit kunnu flyta inn í húsini í ár, sigur Pidi.





# Lastbila- og kranaarbeiði

**Alt lastbila- og krana-arbeiði verður gjørt bæði skjótt og bíliga**

Vit hava lastbilar við krana, sum kunnu klára mestsum allar uppgávur.

**Skalt tú t.d. hava**
- Grús í túnið
- Koyrt havaburturkast vekk
- Bátin á flot/upp
- Flutt grót

**Ring og fá eitt óbindandi tilboð!**

**Eyðun Hansen · tlf. 724014 / 420414 · fax 424047**

# Góða Fjarðasteunu



**Opið:**
Hóskvøldið 6/7 er opið til kl. 20
Fríggjakvøldið 7/7 er opið til kl. 20
Leygardagin 8/7 er opið til kl. 14

Teir vælumtóktu Leðurjakkarnir eru aftur at fáa.

**Útvaldar vørur**

25,- 100,- 50,- 150,- 75,-

**Vest Móti**
Vestmanna · Tel 42 44 07